

# Statoil fyrireikað til yvirgang

Deil:

Jan Müller

28.07.2014 - 10:20

Oljan.fo

Trygdartilbúgvingin hjá Statoil er herd, eftir at norsku myndugleikarnir hava fingið ábendingar um, at yvirgangsmenn eru á veg til Noregs at søkja at.

-Vit fyglja sera væl við støðuni. Vit hava gott samband við myndugleikarnar og fremja tey tiltøk, sum vit halda vera neyðug, sigur Statoil-forstjórin, Helge Lund, við tíðindastovuna NTB.

Fyri hálvum øðrum ári síðani var Statoil fyri einari yvirgangsatsókn, tá yvirgangsmenn søktu at gassverkinum In Aménas í Algeria. Yvirgangsmenninir tóku fleiri starvsfólk gíslar, og fimm norsk starvsfólk hjá Statoil doyðu undir atsóknini.

Helge Lund ásannar, at síðani hendingina í In Aménas hevur Statoil endurskoðað tilbúgvingina, men hann vil tó ikki siga, hvussu tilbúgvingin er broytt síðani.

-Yvirgangur kann raka allastaðni. Vit sleppa heldur ikki undan slíkum í Noregi, og okkara uppgáva er at gera alt fyri at avmarka váðan, sigur Helge Lund við NTB.